# NÝGGJ PLANET Í RINGRÁS

Sosialurin kann í dag bjóða lesarum sínum vælkomin á eina nýggja Planet – eitt ungdómsblað. Harafturat hava Sosialurin og Føroya Tele í felag tikið stig til ein nýggjan ungdómsportal á internetinum – planet.fo.

Sosialurin hevur dagliga ein breiðan og fjølbroyttan tíðindaflutning um øll viðurskifti í samfelagnum – eisini viðurskifti, sum viðkoma og snúgva seg um ungdómin. Sosialurin dekkar tónleikalívið, ítrótt, mentan og onnur øki, har ungdómur er við og fylgir við. Men umframt vanliga tíðindaflutningin fer Sosialurin frameftir at hava serligar ungdómssíður í blaðnum aðru hvørja viku. Hetta vil Sosialurin gjarna gera sum eina serliga tænastu til teir ungu lesararnar, sum vit vita eru sera nøgvir í tali.

Umframt sjálvt blaðið, sum verður í Sosialinum annan hvønn hósdag, hava Føroya Tele og Sosialurin í felag gjørt ein nýggjan ungdómsportal, sum verður dagførdur fleiri ferðir um dagin við tíðindum um tónleik, móta, tey kendu og annað.

Hesin ungdómsportalur skal verða nýggja heimstaðið hjá føroyskum ungdómi á netinum og fer at avloysa Pop.fo, sum hevur verið ein tónleikaportalur burturav. Frameftir verður tað besta hjá Pop.fo samantvinna við annað á Planet.fo.

Í blaðnum Planet ber til at lesa um spennandi fólk, sum hava gjørt vart við seg, tíðindi verða um tónleik og tey kendu, á mótasíðum fara føroysk modell at sýna fram klæði, sum eru frammi í tíðini, og aðrir tættir verða eisini við. Ætlanin er eisini, at Planet á prenti og neti í felag skulu skapa kjak um viðkomandi evni millum ungdóm.

Blaðið í dag er fyrsta royndin at gera ungdómssíður í Sosialinum, og samstundis er ungdómsportalurin Planet.fo farin í ringrás um føroyskan ungdóm. Vælkomin á eina nýggja Planet.

Sosialurin

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | 200 | Muscleman-Blað |
| 2 | Akon | Lonely |
| 3 | Makrel | Forever And Beyond |
| 4 | Jan & Jákup | For lekkur til Prixið |
| 5 | Nephew | Wn Wannabe Darth Wader |
| 6 | Lív Hansen | Eitt Annað Land |
| 7 | Gwen Stefani | Hollaback Girl |
| 8 | 50 Cent | Candy Shop |
| 9 | 2Pac feat. Elton John | Ghetto Gospel |
| 10 | Backstreet Boys | Incomplete |
| 11 | Black Eyed Peas | Don't Phunk With My Heart |
| 12 | Deja Vu | Confused |
| 13 | Daniel Powter | Bad Day |
| 14 | Wig Wam | In My Dreams |
| 15 | Carpark North | Human |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gavin DeGraw | I Don't Want To Be |
| 2 | Jakob Sveistrup | Talking To You |
| 3 | Coldplay | Speed Of Sound |
| 4 | Nephew | Worst/Best Case Scenario |
| 5 | Green Day | Holiday |
| 6 | Black Eyed Peas | Don't Phunk With My Heart |
| 7 | Raveonettes | Love In A Trashcan |
| 8 | Swan Lee | What Is Love? |
| 9 | Daniel Powter | Bad Day |
| 10 | Gwen Stefani | Holloback Girl |
| 11 | Wig Wam | In My Dreams |
| 12 | Carpark North | Human |
| 13 | Backstreet Boys | Incomplete |
| 14 | Oasis | Lyla |
| 15 | D-A-D | Svare Yourself |
| 16 | Snoop Dogg og onnur | Signs |
| 17 | Robyn | Be Mine |
| 18 | Gorillaz | Feel Good Inc |
| 19 | Akon | Lonely |
| 20 | Kent | Palace & Main |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Crazy Frog | Axel F |
| 2 | Akon | Lonely |
| 3 | Gorillaz | Feel Good Inc |
| 4 | Foo Fighters | Best Of You |
| 5 | Amerie | 1 Thing |
| 6 | The Black Eyed Peas | Don't Phunk With My Heart |
| 7 | Coldplay | Speed Of Sound |
| 8 | Gwen Stefani | Holloback Girl |
| 9 | White Stripes | Blue Orchid |
| 10 | Audio Bullys ft. Nancy Sinatra | Shot You Down |
| 11 | Tony Christie & Peter Kay | (Is this the way to) Amarillo |
| 12 | James Blunt | You're Beautiful |
| 13 | Game ft. 50 Cent | Hate it or Love it |
| 14 | Oasis | Lyla |
| 15 | Funeral For Friend | Streetcar |
| 16 | Bodyrockers | I Like The Way |
| 17 | Snoop Dogg og onnur | Signs |
| 18 | Ben Adams | Sorry |
| 19 | Will Smith | Switch |
| 20 | Jenifer Lopez | Hold You Down |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mariah Carey | We Belong Together |
| 2 | Gwen Stefani | Hollaback Girl |
| 3 | Ciara ft. Ludacris | Oh |
| 4 | 50 Cent | Just A Lil Bit |
| 5 | The Black Eyed Peas | Don't Phunk With My Heart |
| 6 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 7 | The Game ft. 50 Cent | Hate It Or Love It |
| 8 | Will Smith | Switch |
| 9 | Kelly Clarkson | Since U Been Gone |
| 10 | The Killers | Mr. Brightside |
| 11 | Rob Thomas | Lonely No More |
| 12 | Bobby Valentino | Slow Down |
| 13 | Backstreet Boys | Incomplete |
| 14 | 3 Doors Down | Let Me Go |
| 15 | Ying Yang Twins | Wait |
| 16 | Pretty Ricky | Grind With Me |
| 17 | Akon | Lonely |
| 18 | 50 Cent ft. Olivia | Candy Shop |
| 19 | The Pussycat Dolls | Don't Cha |
| 20 | Trick Daddy og onnur | Sugar |

## COLDPLAY VIÐ NÝGGJARI FLØGU

Nú er rockbólkurin Coldplay klárur við eini nýggjari útgávu, sum kemur eftir risastóru søluna av »A Rush Of Blood To The Head«. Mánadagin kom útgávan »X&Y« í sølubúðunum, og tað er plátufelagið Parlophone, sum gevur hana út. Tónleikurin á fløguni er tikin upp í ymiskum upptøkuhølum í Onglandi seinasta árið. Framleiðarar hava verið Danton Supple og Ken Nelson, men bólkurin hevur eisini sjálvur verið við at leggja tónleikin til rættis.

Í mai mánaði kom fyrsta stakfløgan av útgávuni út. Hon kallast »Speed of Sound«. Og nú ber so til at hoyra allar hinar sangirnar á nýggju útgávuni hjá Coldplay.



*Coldplay gjørdist eitt stórt navn við útgávuni »A Rush Of Blood To The Head«. Nú er uppfylgjarin klárur*

## FØROYSKIR BÓLKAR Á TOPPINUM

Hetta eru góðir dagar hjá føroyskum tónleiki á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpinum. Í løtuni eru tað føroyskir sangir, sum liggja á fleiri av teimum fremstu plássunum, og harafturat eru aðrir føroyskir sangir eisini inni á listanum.

Vanliga eru tað tey útlendsku hittini, sum standa sterk á 15 teimum bestu, men seinastu vikurnar hava føroysku bólkarnir av álvara gjørt um seg.

Nú er tað punkbólkurin 200, sum liggur ovast við sanginum um Muscleman-blaðið. Makrel er nummar 3 við Forever and Beyond, og nummar 4 eru Jan & Jákup, sum eru for lekkrir til Prixið.

Afturat teimum eru eisini Lív Hansen og Deja Vu inn á listanum, og hesa vikuna hevur Eyðun Nolsøe eitt eykalag við. Tað ber til at atkvøða fyri sangunum á listanum á heimasíðuni hjá Útvarpinum –

## ÚTSELT Í SKANDERBORG

Tað er ikki bara í Føroyum, at stóru tónleikatiltøkini hava vind í seglunum. Eisini í Danmark er sera stórur áhugi fyri teimum mongu festivalunum. Ein av teimum er Skanderborg festivalurin – Danmarks smukkeste festival, sum teir taka til.

Har hava fyrireikararnir boðað frá, at tað er útselt til festivalin í ár, sum verður hildin í døgunum frá 11. til 14. august.

Høvuðsnøvn á festivalinum verða Texas, The Prodigy, Alice Cooper og Anastascia, og tað hevur av álvara skapt áhuga fyri festivalinum, har eisini nógv av teimum størstu donsku nøvnunum í løtuni spæla.

Í Føroyum hava bæði G! Festivalurin og Summar Festivalurin sagt frá, at forsølan av atgongumerkjum gongur sera væl og munandi betur enn í fjør, tá ið báðir festivalarnir høvdu sera nógv vitjandi.

Útgevari: Sosialurin | Blaðfólk: Eydna Skaale, Eyðun Klakstein | Myndir: Jens Kristian Wang | Snið og umbroting: Pf. Føroyaprent | Prent: Prentmiðstøðin

planet.fo